# – Stórt tillukku til løgregluna!



*Carl August Arge, rúsevnis- og narkotika-ráðgevi, fegnast um handtøkurnar hjá løgregluni*

**Carl August Arge, rúsdrekka- og narkotika ráðgevi, eisini kendur sum ein av stigtakarunum til náttarravnarnar, fegnast um, at løgreglan endiliga hevur handtikið fólk í sambandi við rúsevnissølu í Føroyum**

NARKOTIKA
*Ingrid Bjarnastein*

– Eg havi ikki hoyrt tíðindini, men hetta varð eg ótrúliga glaður fyri at hoyra, sigur ein ógvuliga fegin Carl August Arge í telefonini, tá Sosialurin bað um eina viðmerking til handtøkurnar hjá løgregluni.

– Hetta hevur jú verð væntað leingi og fólk hava longst eftir, at hetta fór at henda. Vit hava jú vitað, at tað hevur verið skipað søla í Føroyum leingi, og løgreglan hevur allatíðina sagt, at teir arbeiða við málinum. Eg kann ikki gera annað enn at geva mítt stóra tillukku til løgregluna.

Carl August Arge sigur, at nú er bert at vóna at fólkini fáa sína revsing. Bakmenninir eru snild, og teir kenna smogurnar, og hava ferð eftir ferð megnað at snúgva sær undan. Hann vónar, at løgreglan hevur nóg nógv prógv til at fella teir.

### Men...

... hetta er bert ein trupulleiki. Sambært Carl Augusti er drekking hjá ungum undir 18 minst ein eins stórur trupulleiki, sum tað, at ung nýta rúsevnir.

– Tað vísir seg, at alt ov nógv ung drekka ov nógv og ov tíðliga. Hetta er ein trupulleiki, ið verður tikin í ov lítlum, álvara. Lógin sigur jú, at tú hevur ikki loyvi at keypa fyrr enn tú ert fyltur 18 og tú hevur heldur ikki loyvi at keypa til nakran, ið er yngri enn 18. Hetta eigur at verða sætt, sum eitt lógarbrot, tá ung undir 18 rúsa seg, metir Carl August.

Rúsdrekka- og narkotika ráðgevin heldur, at tað er beinleiðis samband millum drekking, rúsevnisnýtslu og royking. Tað eru tey somu fólkini, sum drekka, roykja og nýta rúsevnir. Um tú byrjar at roykja, er størri vandi fyri at tú fer at roykja, og um tú longu drekkur og roykir er vandin so aftur størri fyri, at tú fert yvir til tey sterkaru rúsevnini.

– Meira eigur at vera gjørt fyri at fáa betri skipað rúsfrí umhvørvi. Farið skal verða út á skúlar og broyta hugburðin hjá teimum ungu. Eisini skal teirra førleiki til at siga nei styrkjast. Nógv hevur verið gjørt, men nógv meira kann enn gerast.

Men Carl August var tó framvegis fegin um, at tað eydnaðist løgregluni um at fáa tikið bakmenninar til rúsevnissøluna. Hetta er nakað, sum hann vónar, kann steðga rúsevnisnýtsluni her á landi.

Størsta narkoátak í Føroya søgu:

# Níggju menn tiknir



*Hesin maðurin varð mikudagin á middegi handtikin í Havn. Løgreglan heldur seg hava fingið hendur á bakmonnunum, sum skipa fyri smugling og sølu av rúsevnum í Føroyum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Løgreglan í Føroyum framdi í gjár tað størsta átakið móti narkotikasmugling nakrantíð. Níggju menn vórðu handtiknir í Føroyum, og ein varð tikin í Danmark. Løgreglan metir seg hava fingið fatur í teimum týdningarmiklastu bakmonnunum, ið standa fyri innflutningi av ólógligum rúsandi evnum til landið**

NARKOTIKA
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Føroyum heldur seg hava fingið hendur á teimum monnum, ið standa fyri størsta partinum av innflutninginum av rúsandi evnum til Føroyar.

– Vit hava sterkan illgruna um, at teir handtiknu standa fyri størsta partinum av innflutninginum av rúsandi evnum til Føroyar, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini.

Á middegi í gjár framdi løgreglan í Føroyum tað størsta átakið móti narkotikasmugling nakrantíð. Einir 40 løgreglumenn vóru við í átakinum.

Løgreglan gjørdi níggju húsarannsóknir í bústøðunum hjá teimum níggju monnunum, ið eru millum 25 og 43 ára gamlir. Átta av monnunum eru búsitandi í Havn, meðan ein varð tikin í Klaksvík.

Allar rannsóknirnar vórðu framdar samstundis. Løgreglan hevur framt átakið í samstarvi við narkodeildina hjá løgregluni í Keypmannahavn, har ein maður varð tikin. Hann er varðhaldsfongslaður í trettan dagar fyribils. Óvist er, hvussu leingi hinir verða varðhaldsfongslaðir.

Undir húsarannsóknunum eru húsini hjá teimum skuldsettu heilt einfalt endavend, og løgreglan hevur leitað eftir próvtilfari. Løgreglan sigur, at undir rannsóknunum hava teir funnið ting, sum kunnu hjálpa teimum í víðari kanningum. Eisini varð leitað á ávísum arbeiðsplássum, har menninir arbeiða til dagligt.

Níggju menn frá donsku løgregluni, sum dagliga arbeiða á rannsóknarliðnum, vóru við í húsarannsóknunum. Løgreglan í Havn hevði ikki nóg mikið av fólki og mátti tí fáa hjálp úr Danmark.

Fimm av monnunum vóru til grundlógaravhoyring í Føroyar Rætti fyrrapartin hósdagin. Teir eru í aldrinum 27 til 35 ára gamlir. Hinir fýra, sum eru í aldrinum 25 til 43 ár, verða leyslatnir fyri fyrst, men teir eru skuldsettir og kunnu vænta at verða ákærdir seinni.

Grundlógaravhoyringin fór fram fyri afturlatnum hurðum, og tí ber ikki til at fáa so nógv at vita um úrslitið av avhoyringini enn.

### Høvuðsmenn

Løgreglan hevur í longri tíð arbeitt við at fanga høvuðsmenninar aftanfyri smuglingina í Føroyum. Nógv tíð og orka er sett av til hetta arbeiðið, og nú sæst úrslitið.

Løgreglan heldur seg hava tikið teir stóru bakmenninar, ið skipa fyri smuglingini og søluni av sterkum rúsandi evnum í Føroyum. Talan er um hassj, kokain, amfetamin og nú eisini ekstasy.

Løgreglan dylur ikki fyri, at ein av bakmonnunum hevur hon havt eyguni eftir í fleiri ár. Hetta er ein dani, sum er miðskeiðis í 30-unum. Hann er tikin nakrar ferðir fyrr, men ongantíð fyri nakað stórvegis brot á lógina.

Nú hevur løgreglan savnað prógv í longri tíð og vónar, at maðurin kann dømast fyri tað umfatandi virksemið av sølu og smugling av narkotika.

Hesin danin varð í 1999 tikin á flogvøllinum, tá hann royndi at stinga hassj í ferðagóðsi hjá Atla Hansen, fyrrverandi tingmanni.

Menninir eru skuldsettir fyri at hava skipað fyri smugling og sølu av stórum nøgdum av rúsandi evnum ígjøgnum longri tíð.

Bergleif Brimvík sigur, at løgreglan hevur gjørt umfatandi kanningar í Føroyum, har hon hevur sett fólk burturav at taka sær av hesum málinum. Seinastu tíðina er størri orka og fleiri fólk sett av til kanningararbeiðið.



29 ára gamal maður:

# Játtaði seg sekan

**Ein 29 ára gamal maður hevur játtað seg sekan í rúsevnissmugling og víðarisølu. Tveir aðrir menn sigast at vera aftanfyri smuglingina**

SMUGLING
*Heri á Rógvi*

Ein 29 ára gamal maður játtaði seg hósmorgunin sekan í at hava smugla rúsevni til Føroya. Í grundlógaravhoyringini játtaði maðurin seg sekan. Í ákæruritinum vóru tveir aðrir menn eisni nevndir, sum partar av smuglingini og søluni.

Málið var fyri afturlatnum hurðum, men tað var møguligt at hoyra ákæruritið lisið upp. Tað var ákærin, Dorte Møller Andersen, sum ynskti hetta, og tað verjan eisini samdur við. Tann ákærdi varð handtikin av løgregluni beint eftir miðdag mikudagin. Sambært galdandi reglum, so skal tann handtikni fyri ein dómara innan eitt samdøgur.

Í ákæruritinum varð sagt, at maðurin hevði verið til at smugla inn ikki “ubetydeligt” mong av rúsevni. Bæði hash og kokain vórðu nevnd í ákæruni, sum maðurin altso játtaði seg sekan í.

Tá blaðið fór til prentingar, var ikki greitt, um maðurin skuldi varhaldsfongslast.

### Einki um hinar

Í hinum rættarhølinum í Christian Pløyens gøtu vóru tríggir menn til grundlógarforhoyr, áðrenn miðdag. Tveir av teimum skuldu bert fyri ein dómara, og har varð einki ákærurit lisið.

Tann triði var til grundlógarforhoyr, men hetta fyri afturlatnan hurðum, og tað eydnaðist ikki at fáa nakað at vita, hvørt hann játtaði seg sekan ella ikki. Ei heldur varð aldurin á viðkomandi nevndur.

# Tríggir norðmenn tiknir

HERVERK
*Stefan í Skorini*

Mikukvøldið handtók løgreglan í Havn tríggjar norðmenn, ið vóru farnir at gera um seg í havnargøtum.

Teir tríggir menninir eru millum 22 og 28 ára gamlir. Teir fiska allir við norska línubátinum Øyliner, sum í vikuni varð tikin fyri at hava ov nógva hjáveiðu umborð.

Meðan báturin liggur við bryggju í Havn hevur manningin verið í býnum og fingið ov nógv av rúsdrekka niðurum.

Hetta førdi til, at teir fóru at gera herverk í miðbýnum. Løgreglan fekk boðini umleið klokkan hálvum tíggju. Tá gjørdu teir tríggir menninir seg inn á bilar, sum koyrdu í gongugøtuni. Teir hava eisini gjørt seg inn á blómuhandilin, ið liggur á Áarvegnum yvirav Hotel Hafnia.

Løgreglan hevur menninar í varðhaldinum, meðan bíðað verður eftir, at fólk koma við endurgjaldskravi fyri skaðarnar, sum teir hava gjørt á ognir hjá fólki.

Aftur til arbeiðis:

# Flakavirkið í Hvalba letur uppaftur

**Eftir at flakavirkið í Hvalba hevur ligið stilt síðan 1. setember er nú líkt til, at virksemi aftur verður á virkinum. Maru Seafood, sum Jóhan Páll og Jóhan David Joensen eiga í felag, hevur saman við einum samtaki av hvalbingum keypt flakavirkið. Keypsprísurin verður ikki upplýstur**



*Jóhan Páll Joensen hevur tikið stig til keypið av flakavirkinum. Enn er sáttmáli ikki undirskrivaður, men partarnir hava gjørt eina semju um keypið*

FLAKAVIRKI
*Stefan í Skorini*

Tað eru arbeiðsmannafelagið, arbeiðskvinnufelagið og nakrir av djúpvatnstrolarunum í Hvalba, ið saman við Maru Seafood í Klaksvík hava keypt virkið frá Føroya Sparikassa og Nykredit.

Virkið hevur ligið stilt síðan 1. september, tá Heilsufrøðiliga Starvsstovan kravdi, at virkið lat aftur. Orsøkin var, at tað ikki leyk tey heilsufrøðiligu krøvini, sum sett verða einum virki.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði givið eigarunum fleiri ávaringar, og tá einki varð gjørt við at betra um viðurskiftini, varð virkið latið aftur.

### Leingi á veg

Tað hevur leingi ljóðað, at felagið í Klaksvík, Maru Seafood, arbeiddi við at keypa virkið.

– Vit hava arbeitt við hesi ætlanini síðan september mánað, men einki spurdist burturúr fyrr enn nú, sigur Jóhan Páll Joensen, ið ikki vil upplýsa keypsprísin nú.

Hann sigur, at virkið verður rikið eftir sama leisti sum áður. Tá arbeiddi virkið við djúpvatnsfiskasløgum so sum kongafiski, svartkalva og upsa. Tað verða djúpvatnstrolararnir úr Hvalba, ið fara at veita virkinum rávøru.

Jóhan Páll veit ikki, nær virkið letur upp. Hann væntar tó, at nakrir mánaðir ganga, áðrenn framleiðslan kann byrja aftur.

Krøvini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni skulu lúkast. Hetta krevur umvæling av sjálvum bygninginum og umlegging av arbeiðsgongdini. Tá hetta er fingið í rættlag, verður latið upp.

Virkið plagdi at hava eini 50 arbeiðsfólk, og nýggju eigararnir vænta, at talið verður á leið tað sama.

– Vit halda heilt avgjørt, at hetta virkið hevur møguleika at standa seg væl, og tað er orsøkin til, at vit gera hesa íløgu, sigur Jóhan Páll Joensen.

### Fýra virkir

Hetta er fjórða virki, ið Maru Seafood eigur lut í. Felagið varð stovnað í 1998, tá Jóhan Páll og Jóhan David, ið eru systkinabørn, tóku seg úr Kósini í Klaksvík.

Síðani hava teir stovnað virkið Sammut í Klaksvík, ið virkar saltfisk. Maru Seafood eigur eisini part í Norðís á Eiði, ið fæst við frysting og royking, og Vestís í Sørvági, ið virkar saltfisk.

Nú hava teir báðir eisini keypt seg inn í virkið í Hvalba.

Jóhan Páll upplýsir, at Maru Seafood eigur tveir triðingar í øllum hesum virkjunum. Tó verður heldur øðrvísi í virkinum í Hvalba, har partarnir fara at eiga hvør sín helming.

Hann væntar, at tvey feløg verða knýtt at virkinum. Felagið hjá hvalbingum fer at eiga sjálvan bygningin, meðan Maru Seafood fer at standa fyri rakstrinum.



*Nú letur virkið í Hvalba uppaftur, eftir at tað hevur ligið stilt síðan 1. september. Hvalbingar hava saman við Maru Seafood í Klaksvík keypt virki frá Sparikassanum og Nykredit*